## DAGSINS MEINING

# Sjálvsstýrið fekk ikki nýval – men pressu

Hørki Føroya fólk ella Sjálvstýrisflokkurin fáa val á hesum sinni. Tíbetur. Áheitanin hjá Sjálvstýrisflokkinum á løgman um at umhuga eitt nýval, tí óskilið í samgonguni er so stórt, var meiri líkt einum publisitiátaki. – Góvu tíðindi og myndir í Degi og Viku týsdagin okkum ikki eina ábending um tað?

Sjálvstýrisflokkurin er jú dottin burtur í millum í trætuni millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Tað byrjaði jú við eini brævskriving fyrst í mánaðinum, tí Fólkaflokkurin m.a. dittaði sær at taka undir við einum uppskoti hjá Hendriki Old at lækka avgjaldið á bensini.

Men Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki hava “timað” hetta átakið væl, tí seinastu veljarakanningarnar góvu ikki Sjálvstýrisflokkinum nakra serliga undirtøku, og spurningurin er, um flokkurin kom á ting, um val hevði verið.

Tá hetta er sagt, skal Sjálvstýrisflokkurin hava rætt í tí, at tað tykist, at flokkar í landsstýrissamgonguni gjarða út í hesum døgum, nú valfjáltur er komin á, og menn eru um at missa setningin at reka ein stramman fíggjarpolitikk úreygsjón! Men so er spurningurin, um Sjálvsstýrisflokkurin hevur staðið aftastur í tí, sum samgongufólk í kalla útgjarðing.

Vit minnast, at tá uppskotið til hesa fíggjarlóg varð viðgjørt í samgonguni, kravdi Helena Dam á Neystabø at fáa 70 milliónir krónur afturat til síni málsøki. Hóast hon hevur noktað fyri tí, so søgdu onnur í landsstýrinum, at hon hótti at leggja frá sær sær, fekk hon ikki hesa upphædd! Peningurin til hesi mál var neyðugur – eingin ivi um tað – men í eygum Fólkaflokksins er jú peningurin til almanna- og heilsumál jú eisini útgjarðing.

Løgmaður tekur ikki áheitanina um nýval til eftirtektar, men Sjálvstýrisflokkurin hevur fingið “pressu”, og hevur – eins og Tjóðveldisflokkurin – roynt at fingið sær eitt “image” sum fíggjarligur ábyrgdarflokkur. Og so er spurningurin, um formaðurin ikki eisini fekk gjørt seg eitt sindur inn á løgmann, eftir at hann gav henni boðini í februar: annaðhvørt leggur tú sjálv frá tær, ella koyri eg teg úr starvi!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Yvirlýsing frá aðalfundinum hjá Javna

Sagt verður við hesum frá, at á aðalfundinum hjá Javna tann 31. mars, varð fylgjandi yvirlýsing samtykt:

Ásannandi stóru bústaðarneyðina hjá menningartarnaðum í Føroyum í dag, átalar aðalfundurin hjá Javna harðliga hesi og heitir á avvarðandi myndugleikar landsins um, alt fyri eitt at taka henda trupulleika upp til viðgerðar og miðvíst at arbeiða fram ímóti, at menningartarnað fáa mannsømulig íbúðarkor at liva undir.

Í áliti frá Javna um bústaðarviðurskifti hjá brekaðum í Føroyum ár 2000 verður staðfest, at samlaði tørvurin á búplássum til brekað runt landið tey komandi 10 árini eru 81 búpláss. Afturat hesum eru heili 87 búpláss, sum óvissa er um, og 25 har endaliga ikki er mett um tørvin. Nýggjastu tølini um bráfeingis tørv á búplássum er í dag 30.

Tað ið útint er á økinum tey seinastu 20 árini er, at tey flestu menningartarnaðu eru flutt av Eirargarði 14-16 í smærri stovnar og sambýlir. Afturat hesum er 1 sambýli komið í Vági og 1 í Runavík. Alt ov lítið er gjørt fyri at útvega menningartarnaðum bústað uttan fyri foreldraheimið.

Framdu tiltøkini nøkta tí á ongan hátt tørvin og eigur at verið farið til verka beinanvegin, tá verandi støða er ótolandi fyri tey menningartarnaðu og avvarðandi teirra.

# GOD-Digital til Føroya

TÍÐINDASKRIV

GOD Digital, sum dagliga sendir kristiligt sjónvarp til milliónir í øllum Europa, kemur nú til Føroya at presentera tær vælumtóktu sjónvarpsrásirnar.

Simon og Kaja Jacobsen koma til Føroya fyri fyrstu ferð at hava kunningarfundir og seminar um GOD-Digital. Leygardagin kl. 15.00 verður GOD-Digital seminar í høllini í Runavík. Har fara tey at greiða frá arbeiðinum og sýna ymiskt fram, øll áhuga kunnu møta. Tey hava eisini ein GOD-Digital bás á øllum møtunum hjá Teresu Wairimu, har høvi verður at síggja ymiskt og tosa við tey.

GOD-Digital fer frá 1 mai at senda á nýggja satellittinum Eurobird 28.5° eystur, tá kunnu rásirnar væntandi síggjast við væl minni parabolantennu enn nú. Nærri fæst at vita leygardagin.

Umframt The GOD Channel, sum er ókodað, hava tey fleiri aðrar rásir, bæði útvarp og sjónvarp. Umframt 3 sjónvarpsrásir og fleiri útvarpsrásir, sum eru kristiligar burturav, síggja tey, sum tekna seg til GOD-Digital eisini t.d. Sky news, CNN, BBC, sport og fleiri aðrar rásir á tí nýggja satelittinum; men tey leggja dent á, at alt er ”safe viewing”. The GOD Channel er ókodað, men hinar GOD-rásirnar má ein tekna seg til. Tey, sum ynskja at tekna seg til GOD Digital pakkan, kunnu fáa ein ókeypis digitalan móttakara til láns frá teimum. Leygardagin fæst eisini at vita, hvat ein kann síggja á GOD-Digital.

The GOD Channel – fremsta kristiliga rásin í Europa, sum sendir alt døgnið – verður bjóðað ókeypis til kaðal og antennufeløg í Føroyum. The GOD Channel er í dag á teimum flestu stóru kaðalfeløgunum í Danmark og restini av Skandinavia.

Simon fer leygardagin at tosa um: ”Et sandt eventyr i den kristne verden!” um hvussu Gud byrjaði í London, og tað undrið, sum er farið fram tey síðstu 5 árini og ”TV mediet som Nutidens store redskab for vækkelse og udbredelse af evangeliet!”

Simon og Kaja eru í Føroyum frá 19 til 23 apríl.

Teirra adressa í Danmark er: GOD DIGITAL SCANDINAVIA, Postboks 12, DK 9800 Hjørring, Tel 0045 9890 9150, e-mail: scandinavia@godnetwork.com, heimasíða: www.god-digital.com

# Frá Dreymi til veruleika

TÓNLEIKUR

Í dag klokkan 16 skipar Norðurlandahúsið fyri almennum fyrilestri og paneli í Útvaprs Høllini, kallaður »Frá Dreymi til veruleika«.

Fyrilesturin er ætlaður teimum, sum ynskja at koma víðari innan tónleik og tónleikavinnuna.

Í Panelinum verða: Hans Otto Bisgaard, sjónvarpsmaður, Stefan Fryland og Lennarth Backman, plátuframleiðarar, Lars Mortensen, Jelling Festivalen, Peter Møller Madsen, Nibe-Festivalen, Uffe Christensen, Musikummælari í Jyllands Posten, Erik Jensen, Musikummælari í Politiken, Torben Kruse, Frá Dansk Musikerforbund og Jeppe Nissen, Fajabefa.

Pallboðrsluttakarnir fáa umleið 10 minuttir hvør, og síðan verður orðaskifti um, hvat tú sum tónleikari eigur at leggja dent á fyri at t.d. ynskir at liva av tónleikinum.

Orðstýrari verður Petur Mohr Reinert.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Ferðavmarkarar í bilum

**Jón Kragesteen,**
*dagligur leiðari á Ferðslutrygd*



– Skulu vit sleppa undan ferðsluvanlukkum, har ungir menn í berum ferðrúsi á høpisleysan hátt eru sær sjálvum og øðrum at bana, má okkurt álvarsligt stig verða tikið. Sum er, er hámarksferðin hjá flestu bilum oman fyri 160 km/t, sum jú er meira enn tvær ferðir skjótari enn hægst loyvda ferð í Føroyum!

Harumframt vita vit eisini, at tað ber til at keypa bilar, sum kunnu koyra upp í 250 km/t ella meira ella tríggjar ferðir skjótari enn hægst loyvda ferð.

**»Vitið skolar út«**
Ungdómur er nú einaferð ungdómur, og sjálvt um hann fyri tað mesta er skilagóður, so eru tað løtur, tá ið ”vitið skolar út” - og tá henda tær stóru ferðsluvanlukkurnar, sum so at siga hvørt ár krevja mannalív. Og tær vilja halda fram at henda, soleingi sum unglingar hava fría atgongd til bilar við ovurstórum motori. Hetta er stutt og greitt orsøkin til, at vit mugu gera onkrar avmarkingar í bilarnar, so teir ikki kunnu koyra nógv skjótari enn t.d. 110 km/t, sum eisini er markið í lógini, tá ið koyrikortið kemur í vanda at verða tikið. Við hesum verður eisini sagt, at tað er ikki ferðin í gerandisferðsluni um teir 80 km/t, sum er stóri trupulleikin, heldur ikki ferðin, sum fer upp á 100-110 km/t - t.d. í yvirhálingum. Hesi orð skulu tó als ikki skiljast, sum at undirritaði mælir til eina hækking av 80 km/t ferðmarkinum, men heldur ein staðfesting av veruleikanum.

**Hvussu við yvirhálingum?**
Nú vil onkur kanska mæla ímóti og siga, at tú má hava nakað av eyka orku fyri at sleppa tær burtur úr óvæntaðum truplum støðum sum t.d. at yvirhála ein trailara. Men fyri at gera tað, skuldi ikki verið neyðugt at farið upp á 150 km/t, og vónandi er tað ikki henda ferðin, bilar nýta at yvirhála við í vanligari gerandisferðslu. Mín støða er, at um tú í Føroyum ikki fært yvirhálað við bili, sum er ferðavmarkaður at koyra t.d. 110 km/t um tíman, so er annaðhvørt ikki neyðugt at yvirhála, ella er okkurt heilt annað galið.

**Hvønn rakar ferðavmarking av bilum?**
Vóru bilarnir ferðavmarkaðir at koyra í mesta lagi 110 km/t, høvdu tað av góðum grundum verið fá, sum yvirhøvur høvdu merkt nakað, tí tað eru í veruleikanum ikki so nógvir bilar, sum koyra skjótari enn 110 km/t. Men teir, sum gera tað, eru sum vituligt, sera vandamiklir. Og hagtølini vísa, at í allarflestu førum eru tað ungir menn í aldrinum 18 til 24 ár, sum bjóða náttúrukreftunum av. Hetta hendir fyri stóran part um náttina og serliga í vikuskiftunum. Í summum førum er rúsevni uppií, men fyri ein stóran part eru fólk edrú; men eru hóast tað í rúsi, nevniliga tí rúsinum, sum adrenalinið gevur. Vit mugu bara viðganga, at tað - at koyra við fúkandi ferð, fær eina kitlan at fara ígjøgnum kroppin hjá nógvum. Hetta, at ríða á eggini – so nær vandanum, sum til ber – og hóast tað sleppa undan, uttan nakað hendi, gevur eina ”forloysandi” kenslu. Aftur at hesum er jú væl kent, at ungir menn hava eina trongd at vísa seg og gera brøgd, og tíverri gongur tað eisini fyri seg í ferðsluni.

**»Føroyar sum ferðslutrygt øki« – tíðaravmarkað royndarverkætlan**
Eitt hugskot kundi verið at gjørt eina royndarverkætlan í eitt tíðarskeið, t.d. undir heitinum ”Føroyar sum ferðslutrygt øki”. Í veruleikanum skuldi verið lagamanni at gjørt slíkt her, tí Føroyar liggja jú fjarskotnar úti í Atlantshavi, so møguleikin at renna seg í lógirnar hjá okkara grannum er ikki serliga stórur. Uttan iva hevði borið til at gjørt teknisku ferðavmarkingarnar óvirknar hjá teimum lutfalsliga fáu bilunum, sum fara uttanlands ta einu ferðina um árið.

Trupulleikin viðvíkjandi ferðslu og ungdómi er ikki serføroyskur, um enn vit kanska hava nakað størri trupulleikar av hesum slagi enn okkara næstu grannar. Ein royndarverkætlan, sum tann nevnda, hevði uttan iva vakt ans í øðrum londum, og fylgt hevði verið væl við, hvussu gekst henni.

**Forðingar fyri ferðavmarkingini**
At síggja til eru ongar álvarsligar tekniskar forðingar at avmarka ferðina, í øllum førum ongar, sum ikki við tíðini kunnu verða loystar. Hetta er eisini galdandi fyri lógarkarm og fyriskipanir.

Harafturímóti eru nógvar aðrar forðingar, sum eru saman bundnar við hugburð.

Hvør er t.d. hugburðurin aftanfyri, at vit hava teir bilar, sum vit hava? Tað er einki at taka seg aftur í, at samanspælið millum bilídnaðin og marknaðin er avgerðandi fyri, hvussu bilarnir eru háttaðir og hvørjar eginleikar, teir hava. Hetta hóast tey ymisku londini royna at seta upp fyriskriftir og standardir við atliti at trygdini og umhvørvinum.

Vit kunnu fegnast um, at trygd í bili seinastu árini er vorðin søluvøra. Sum dømi um trygdartiltøk kunnu nevnast: trygdarbjølgar (airbags), ABS bremsur, ESP-skipan, trygdarkabina og betran av sjálvum bilbeltinum. Men vit mugu eisini ásanna, at tá ið bilar verða seldir, verður als ikki bara tosað um bilin sum flutningstól, nei bilurin er so nógv annað. Hann skal vera smartur og kekkaður, og ikki minst skal hann kunna koyra skjótt. Úrslitið er, at stórur partur av bilunum á vegum okkara kunnu koyra væl skjótari, enn lógirnar í allarflestu londum loyva.

Fyri nógvum er bilurin so at siga ímyndin av tí persónliga frælsinum, og ein ferðavmarking av bilunum vil av summum verða tikin sum ein skerjing av persónliga frælsinum. Men í veruleikanum eru bilarnir longu ferðavmarkaðir, teir kunnu jú ikki koyra óendaliga skjótt, summir kunnu koyra 150, aðrir 180 og upp aftur aðrir 250, so ”persónliga frælsið” er longu avmarkað. Og kunnu vit yvirhøvur tosa um persónligt frælsi at bróta lógina? Hægst loyvda ferð er framvegis 80 km/t!

**Samanumtikið**
Tað skal verða undirstrikað, at orsøkin til at undirritaði hevur spælt henda ”bóltin” út, er fyri at vísa á, at upplýsing og útbúgving tíverri ikki er nóg mikið, um vit veruliga ætla okkum at sleppa undan álvarsligum ungdómsferðsluvanlukkum. Tí mugu vit gera okkurt, sum forðar fyri, at ungdómurin fær frítt rásarrúm í bilum, sum eru reinar ferðmaskinur, sum kunnu koyra 150 km/t - ja upp í 200 km/t ella meira – einar tvær til tríggjar ferðir skjótari enn tað, samfelagið annars vil hava, at bilar í mesta lagi koyra.

Tað er ikki av leið at samanbera skotvápn og bilar. Riflur t.d. verða mettar at vera so vandamiklar, at um t.d. unglingar ótarnaðir sleppa at handfara tær, er ov stórur vandi fyri, at teir kunnu taka óráð fyri. Tí er í Føroyum ikki loyvt einum og hvørjum at eiga riflu, og lógin er galdandi fyri øll, hóast tað helst bara er fá fólk, sum trupulleiki er av í hesum sambandi. Bara í undantaksførum verður loyvi givið, t.d. alarum, at skjóta kóp. Viðvíkjandi bilum kundu undantaksførini verið løgreglubilar, ambulansur og sløkkiliðsbilar.

Við at seta ferðavmarkara í bilar, verður ikki sagt, at løgreglan skal gera minni við at ansa eftir ferðsluni, heldur tvørturímóti. Løgreglan eigur at halda fram at betra um eftiransingararbeiðið við vanligari patruljering. Og løgreglan eigur eisini at fáa øll tól, sum til ber at fáa fatur á, sum kunnu gera eftiransingina av ferðsluni betri. Her verður hugsað um eftiransing við lasara, og ikki minst mugu vit hava sjálvvirkandi eftiransing við myndatóli og lasara til Føroya, so at eftiransingararbeiðið verður so umfatandi, sum til ber.

Samstundis sum betrað verður um eftirlits- og eftiransingararbeiðið, eiga vit eisini at gera lógarverkið og revsiskipanina so skilagóða, sum til ber.

Ferðavmarking í bilum sleppur okkum sjálvandi heldur ikki undan at halda fram at útbúgva og upplýsa. Og aðrar atgerðir eiga eisini at verða framdar, t.d. at seta serligar treytir og skipanir í verk viðvíkjandi koyrikortinum hjá teimum ungu. Tað er eisini greitt, at vit mugu hava venjingarbreyt at brúka í sambandi við koyrikortarútbúgvingina, so vit øll undir skipaðum viðurskiftum m.a. verða útbúgvin at koyra í hálku.

Sum skilst er áhugi millum manna at fáa øki til motorítrótt, tað verið seg fyri motorsúkklur, Stock Car Racing, Rally, Offroad osfr. Vit, sum arbeiða í ferðslutrygdararbeiðinum, kunnu í øllum førum ikki vera ímóti, tá ið fólk, sum hava serligt ynski at uppliva ferðspenning - biðja um loyvi at gera hetta á økjum, sum eru avskorin frá alfara vegi, her kunnu vit ikki annað enn viðmæla.

At enda skal verða víst á, at tað at seta ferðavmarkarar í bilar ikki loysir ferðslutrupulleikarnar í tætt bygdum øki, har fólk eru í vanda fyri at verða ákoyrd. Í íbúðarøkjum, við skúlar og í handilsøkjum má framhaldandi verða arbeitt fyri, at tað verður ógjørligt at koyra skjótari enn 30 km/t.

Og eitt mugu vit ikki gloyma, nevniliga: at nýta bilbeltið – altíð!

Annarhvør, sum hevur latið lív í ferðsluni og ikki nýtti beltið, kundi verið sloppin við lívinum, um bilbeltið varð nýtt. Hetta eiga vit alsamt at upplýsa um, og tær lógir og fyriskipanir, sum eru settar í verk hesum viðvíkjandi, mugu eisini verða hildnar.

SPINNING AEROBIC

Byrja 23. apríl
Enda 23. juni

Komið inn í YNDI og verið væl fyri til summarið. Vit hava sum vanligt nógv ymisk sløg av kropsvenjingum, so sum aerobic, spinning, trimming og step. Venjingarnar hóska væl til hondbóltspælarar, ið júst eru lidnir við kappingina. Tað ber eisini til at biðja um tímar til arbeiðspláss, størri bólkar o.t.

AEROBIC

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:15 – 18:30 Aerobic - vand Tórhalla/Kirstin | 16:00 – 17:00 Trimmari Tórhalla | 17:15 – 18:15 Low - kvinnur Elsa Maria / Anna Maria | 15:00 – 16:00 Trimmari - øll Tórhalla |
| 18:30 – 19:30 Trimmari Tórhalla/Kirstin | | | 18:00 – 19:00 Aerobic - byrjarar Elsa Maria |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Ingrid | | 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Kirstin/Tórhalla | 19:00 – 20:15 Stepp & Styrki Kirstin |
| | | 20:00 – 21:00 Aerobic - menn Elsa Maria | |

Kostnaður fyri alt skeiðið:
1 tími um vikuna: 360,-
2 tímar um vikuna 600,-
3 tímar um vikuna 760,-

Skúlanæmingar
20% avsláttur
20% avsláttur

SPINNING

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| | 17:00 – 18:00 Spinn øll Ann | | 16:00 - 17:00 Spinn øll Ann | 14:00 - 15:00 Spinn øll Skiftandi venjarar |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Ingrid | 19:00 – 20:00 Spinn vand Eyðun | 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Kirstin/Tórhalla | 17:00 - 18:00 Spinn byrjarar Ann | |

YNDI
v/ *Elsa Maria Bærentsen*

Tilmelding fer fram í hølum okkara yviri við Strond, leygardagin 21.apríl frá kl. 14.00-15.00. Eisini ber til at ringja í YNDI 311311
Elsa Maria tlf. 310025, 312868
Tórhalla tlf. 317671
Ann tlf. 421095



Yviri við Strond 21
FO-100 Tórshavn
e-mail: yndi@post.olivant.fo